# Viðtøkur fyri Hagafelag Føroya

## I Navn og heimstaður

§ 1. Navn felagsins er Hagafelag Føroya.
Hjánavn felagsins er Hagafelagið.
Heimstaður felagsins er bústaður nevndarformansins.

## II Endamál felagsins

§ 2. Endamál felagsins er at virka fyri rættinum at fara í hagan, úr fjøru niðan á fjallatind. Felagið skal virka fyri at varðveita og menna eitt fjølbroytt, heilsugott og virkið lív í haganum umframt at arbeiða fyri at verja náttúruna.

*Stk. 2.* Endamálið verður framt við:

a) at røkja áhugamál felagsins í mun til viðkomandi myndugleikar, felagsskapir og onnur

b) at arbeiða fyri at fáa staðfest rættin til frítt at fara í hagan

c) at arbeiða fyri, at børn og ung fáa upplæring um mentan og virði knýtt at gongu og virksemi í haganum

d) at arbeiða fyri, at frítíðarlív í haganum verður meiri atkomiligt fyri allar íbúgvar landsins

e) at virka fyri at menna fysisku karmarnar fyri gongu í haganum

f) upplýsandi virksemi í almenna rúminum, sum stuðlar upp undir endamál felagsins um skynsama atferð, trygd og virðing fyri haganum og tí virksemi, ið gongur fyri seg har

g) at veita limum felagsins ráðgeving og vegleiðing

## III Limaskapur

§ 3. Einstaklingar, feløg og stovnar, ið viðurkenna endamál og lógir felagsins, kunnu gerast limir.
*Stk. 2.* Limir kunnu melda seg úr felagnum við skrivliga at venda sær til nevndina.
*Stk. 3.* Er eftirstøða fyri limagjald ikki goldin í seinasta lagi ein mánað fyri aðalfund felagsins, heldur ikki eftir at rykkjari við 1 viku gjaldsfreist er sendur liminum, fellur limaskapurin burtur av sær sjálvum.

§ 4. Limur kann útihýsast úr felagnum eftir aðalfundarsamtykt, ið verður gjørd við vanligum meiriluta.
Stk. 2. **Útihýsing av limi skal greitt tilskilast á skránni fyri aðalfundin.**

## IV Aðalfundur og nevndarval

§ 5. Aðalfundurin er hægsti myndugleiki í øllum viðurskiftum felagsins og verður hildin í fyrsta ársfjórðingi á staði, sum nevndin avger frá ári til ár.
*Stk. 2.* Fráboðan um aðalfund verður saman við skrá fyri aðalfundin kunngjørd í telduposti til limir felagsins í seinasta lagi tvær vikur fyri aðalfundin.
*Stk. 3.* Innkomin mál skulu vera nevndini í hendi tríggjar vikur fyri aðalfundin.
*Stk. 4.* Viðtøkubroytingar skulu samtykkjast á aðalfundi við einum meiriluta, ið telur minst 2/3 av atkvøðunum, sum eru til staðar.

§ 6. Skráin fyri aðalfundin skal altíð í minsta lagi vera henda:
1. Val av fundarstjóra og fundarskrivara.

2. Frágreiðing frá nevndarformanninum um virksemið í farna ári.
3. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi.
4. Val av 5 nevndarlimum og 2 tiltakslimum.
5. Val av grannskoðara.
6. Ásetan av limagjaldi.
7. Møgulig innkomin mál. Nevndin eigur frammanundan at hava tey til viðgerðar.
8. Ymiskt.

*Stk. 2.* Nevndin kann seta onnur mál á skrá. Tey skulu tilskilast í aðalfundarfráboðanini.

§ 7. Limir, ið hava goldið limagjald seinast eina viku fyri aðalfundin, hava atkvøðurætt á aðalfundinum.
*Stk. 2.* Atkvøðast kann við fulltrú, sum fundarstjórin góðkennir. Ein limur kann í mesta lagi atkvøða við fulltrú frá tveimum limum.
*Stk. 3.* Um nevndarlimur ella minst 5 limir krevja tað, skal atkvøðugreiðslan fara fram skrivliga.

§ 8. Eykaaðalfundur verður hildin, um meirilutin í nevndini krevur tað, ella tá minst 1/10 av limunum skrivliga krevur tað.
*Stk. 2.* Fráboðan um eykaaðalfund verður kunngjørd við telduposti til limirnar í seinasta lagi tvær vikur fyri eykaaðalfundin.
*Stk. 3.* Um onki annað er tilskilað í fráboðanini um eykaaðalfund, verður skráin sbrt. § 6 í viðtøkum felagsins.

## V Nevndin

§ 9. Dagliga leiðslan í felagnum skal umsitast í trá við endamál felagsins í § 2.
*Stk. 2.* Nevndarvalið fer fram á aðalfundinum, har øll nevndin stendur fyri vali á hvørjum ári. Nevndarlimir kunnu taka við afturvali.
*Stk. 3.* Nevndin skipar seg sjálv við formanni, kassameistara og skrivara skjótast til ber eftir aðalfundin. Nevndin telur 5 limir og 2 tiltakslimir. Allar avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta á nevndarfundi, har minst 4 nevndarlimir eru møttir. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.
*Stk. 4.* Allir limir felagsins, sum hava goldið limagjald minst eina viku fyri aðalfundin, eru valbærir til nevndina.
*Stk. 5.* Allir limir felagsins hava rætt til at senda mál, sum eru í trá við endamálið í § 2, til nevndina at viðgera.
*Stk. 6.* Nevndin hevur minst 4 fundir um árið.
*Stk. 7.* Allar avgerðir nevndarinnar verða at skriva í fundarbók.
*Stk. 8.* Nevndin kann bjóða serkøn fólk við á nevndarfund eftir tørvi. Tey serkønu hava tó ikki atkvøðurætt.
*Stk. 9.* Formaðurin kallar inn til nevndarfund við freist á minst 2 vikur.

## VI Roknskaparhald og tekningarreglur

§ 10. Nevndin hevur ábyrgdina av roknskapinum. Kassameistarin fyrireikar roknskapin.
*Stk. 2.* Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

§ 11. Møguligar inntøkur av virksemi felagsins verða at nýta til frama fyri endamál felagsins og kunnu ikki lutast út til stovnarar felagsins, nevndarlimir ella aðrar privatar persónar. Nevndin orðar reglur fyri, hvørjar avgerðir eru so stórar ella serstakar, at tær krevja aðalfundarsamtykt.
*Stk. 2.* Felagið er ikki vinnuligt.
*Stk. 3.* Felagið verður teknað av formanninum og einum nevndarlimi.

## VII Avtøka av felagnum

§ 12. Hagafelag Føroya kann bara avtakast, um ein aðal- ella eykaaðalfundur, har ein meiriluti, ið telur minst 2/3 av atkvøðunum, sum eru til staðar, samtykkir hetta.
*Stk. 2.* Eftir aðal- ella eykaaðalfundin sbrt. stk. 1 skal nýggjur eykaaðalfundur haldast 6 mánaðir seinni. Um avtøka av felagnum aftur verður samtykt av minst 2/3 av atkvøðunum, sum eru til staðar, er avtøkan endalig.

§ 13. Við avtøku verða ognir felagsins seldar hægstbjóðandi og peningurin goldin Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelagi ella sambærliga manngóðum endamáli.

## VIII Gildiskoma

§ 14. Hesar viðtøkur fáa gildi dagin eftir, at tær eru samtyktar á aðalfundi.